GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

## Leitað verður eftir undirvísara at hava skeið í brúk av Copilot, sum verður partur av skeiðsskránni hjá Gjaldstovuni.

## Um uppgávuna

Gjaldstovan skipar regluliga fyri skeiðum, sum eru ætlað starvsfólkum innan tað almenna, so sum skeið innan KT, Excel, Outlook, Fíggjarstýring o.s.fr. Ætlanin er at leggja eitt skeið um brúk av Copilot Chat og eitt skeið um brúk av Copilot Business afturat verandi skeiðsskrá.

Við hesum útboði vilja vit bjóða veitarum at bjóða upp á uppgávuna at skipa fyri og undirvísa í nýtslu av hesum útgávunum av Copilot.

### Veitingin

Veitarin sum bjóðar upp á uppgávuna skal leggja til rættis og standa fyri undirvísingini av brúk av vitlíkisamboðnum Copilot Chat og Copilot Business, sum er partur av Microsoft 365 pakkanum, sum starvsfólk í almennu fyrisitingini hava atgongd til.

Av tí at vitlíki er eitt nýtt øki, ynskja vit at undirvísarin samskiftir við KT Landsins fyri at tryggja, at undirvísingin tekur støði í ynskinum hjá stovninum.

Ein avtala verður gjørd við veitara, sum skal bjóða fram navngivið starvsfólk, sum hevur teir førleikar okkum tørva. Fyri okkum hevur tað størri týdning at finna rætta undirvísaran, heldur enn rætta veitaran. Tí er tað týdningarmikið at undirvísarin hevur góðar førleikar. Um talan verður um at skifta undirvísara, so skal Gjaldstovan góðkenna nýggja undirvísaran.

Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiði sambært prísinum pr. luttakara, ið veitarin bjóðar í sínum tilboði.

Útboðið fevnir um undirvísing í brúk av Copilot Chat og Copilot Business, so talan er um tvey ymisk skeið, ið bæði verða bjóðað út á heysti 2026 og vári 2027. Møguleiki verður at leingja avtaluna tvær ferðir við einum ári.

Undirvíst verður í undirvísingarhølinum í Albert Hall ella úti á stovnum.

Skeiðið í Copilot Chat er ætlað at vera í 3 tímar, vanliga frá kl. 9.00 til 12.00, og skeiðið í Copilot Business í 5 tímar, vanliga frá kl. 9.00 - 14.00.

Hvussu nógv skeið verða hvørt hálvár er treytað av, hvussu nógv tekna seg. Til ber at siga, at tað í minsta lagi skulu vera eitt ávíst tal at luttakarum, fyri at halda eitt skeið.

## Krøv til veitingina (førleikakrøv)

Undirvísarin skal hava royndir við undirvísing av kt førleikum til starvsfólk.

Undirvísarin skal lýsa tvær líknandi verkætlanir seinastu tvey árini.

Harumframt skal tilboðsgevarin hava royndir við Copilot og hvussu tað kann gerast ein hjálp og effektivisera gerandisdagin hjá starvsfólki.

Vit síggja fyri okkum, at undirvísingin skal fevna um fylgjandi evni, men eru opin fyri at undirvísarin tillagar undirvísingina samsvarandi tí rúkandi menning, sum er á økinum :

- Grundleggjandi fatan av Copilot og vitlíki
- Praktiska nýtslu í Outlook, Word, Excel, Teams o.s.fr.
- Prompting (hvussu ein spyr rætt)

- Verða málrættað:
  - Starvsfólkum
- Veitarin skal kunna:
  - Greiða frá dátuvernd (GDPR)
  - Ábyrgdarfulla nýtslu av vitlíki
  - Hvussu ein handfer trúnaðarupplýsingar í Copilot

Undirvíst skal vera á føroyskum ella norðurlendskum máli.

Tað eitt krav, at undirvísarin hevur vitan um hvussu vitlíki verður gagnnýtt í breiðum samfelagsligum høpi. Harumframt er tað ein fyrimunur, um undirvísarin hevur viðkomandi útbúgving, sum er relevant í mun til fyrrnevndu førleikar.

## Tilboðið skal innihalda

**Góðska**

Tilboðsgevari skal fyrst og fremst lýsa førleikar og royndir hjá undirvísaranum.

**Prísur**

Tilboðsgevari skal áseta prísin pr. luttakara. Prísirnir skulu vera uttan mvg.

**Undirvísingarætlan**
Frágreiðing um hvussu undirvísarin ætlar at skipa undirvísingina.

## Hvussu verður vektað

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis: Góðska 50% og prísur 50%
Útrokningin fer fram á henda hátt:

Góðska

Út frá samlaðari meting av:

- Førleika og royndum sum lýst í hesum útboð
- Meting av hvussu tilboðsgevari fer at megna uppgávuna
- Útbúgving
- Heildarmynd

Stigatal verður givið grundað á ein skala frá 1-50, har 50 er hægsta stigatal.

Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, soleiðis sum vit meta um innkomna tilfarið.

## Prísur

Út frá prísinum pr. luttakara.

Tilboðið við lægsta prísi fyri hvønn luttakara fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli: Tilboð við lægsta prísi pr. luttakara/prís pr. luttakara í tilboði, ið skal metast x 50.

Copilot Chat
Lægsti prísurin pr. luttakara í frymlinum kann aldrin vera lægri enn 1200 kr., t.e. at bjóðar ein veitari prís pr. luttakara lægri enn 1200 kr., verður prísurin pr. luttakra ásettur til 1200 kr. í metingini.

Copilot Business
Lægsti prísurin pr. luttakara í frymlinum kann aldrin vera lægri enn 1600 kr., t.e. at bjóðar ein veitari prís pr. luttakara lægri enn 1600 kr., verður prísurin pr. luttakra ásettur til 1600 kr. í metingini.

Prísirnir skulu verða uttan mvg.

## Dømi um útrokning

Góðska
Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí veitarin hevur fáar og ikki so viðkomandi royndir og førleikar og hevur ikki viðkomandi ella umfatandi útbúgving. Hesin fær 20 stig.
Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar og útbúgving eru á einum miðalgóðum stigi. Hesin fær 35 stig.
Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí ráðgevar hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnar og útbúgvingina. Hesin fær 50 stig.

Prísur
Tilboð 1: Tilboðið við lægsta miðal tímaprísi hjá veitaranum er 1200 kr. Hetta gevur 50 stig.
Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 1000 kr. Hetta gevur 1200/1500 x 50 = 40 stig
Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 1200 kr. Hetta gevur 1200/2000 x 50 = 30 stig

Samlað meting
Tilboð 1: Førleikar 20 stig + prís pr. luttakara 50 stig = samlað meting á 70 stig.
Tilboð 2: Førleikar 35 stig + prís pr. luttakara 40 stig = samlað meting á 75 stig.
Tilboð 3: Førleikar 50 stig + prís pr. luttakara 30 stig = samlað meting á 80 stig. Hesin veitarin vinnur sostatt útboðið.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

## Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist.

Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv.

Útbjóðari kann, eftir tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at útgreina innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreytir.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina.

Útbjóðari tilskilar sær rættin ikki at taka av nøkrum tilboði, um mett verður, at góðskan er ov vánalig ella prísirnir ov høgir.

# Um Gjaldstovuna

Á Gjaldstovuni vilja vit gera Føroyar effektivari.

Hetta stóra mál royna vit at lyfta á fleiri mótum. Vit vilja, at okkara landsbúskapur er skynsamt fíggjarstýrdur við neyvum fíggjartølum. Vit vilja, at stovnar landsins skulu hava bestu og mest framkomnu kt-loysnir. Vit vilja, at innkeyp hjá landinum verður kappingarútsett, so vit fáa meira fyri peningin. Og so vilja vit ganga undan at gera Føroyar til eitt av mest talgildu samfeløgum í heiminum.

Á Gjaldstovuni starvast umleið 70 fólk.

# Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar. Spurningar skulu sendast til keypsportal@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir fyri týsdagin 28. juli 2026, kl. 12.00, verða svaraðir í seinasta lagi týsdagin 11. august 2026, kl. 12.00.

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði:

Freistin er týsdagin 18. august 2026 kl. 12.00. Tilboð skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**